Sea Star leingir við B68

Í gjárkvøldið undirskrivaðu B68 og fyritøkan Sea Star sponsoravtalu fyri komandi kappingarár. Tað vóru formaðurin í B68, Jógvan Højgaard og annar av eigarunum av fyritøkuni Sea Star, Jákup Martin Kjeld, sum undirskrivaðu avtaluna. Teir, sum eiga fyritøkuna Sea Star, eru brøðurnir Jákup Martin og Høgni Kjeld, og saman við teimum var eisini Jan Danielsen, stjóri, við til undirskrivingina. Jógvan Højgaard, formaður í B68, sigur, at hetta helst er hin besta sponsoravtalan, sum felagið hevur gjørt, og hann segði seg vóna, at fyritøkan eisini kemur at fáa nakað burtur úr avtaluni.

Newcastle valdi Keegan

Tað verður 56 ára gamli Kevin Keegan, sum framyvir skal venja Newcastle. Hetta kunngjørdi felagið í gjár. Leitað hevur verið eftir avloysara fyri Sam Allardyce, sum fekk sekkin herfyri. Kevin Keegan er ein høgt virðismettur venjari, og hevur m.a. bæði leikt á enska landsliðnum, og verið venjari hjá tí í tíðarskeiðnum 1999 til 2000. Fram til 2005 var hann venjari hjá Manchester City, og eftir at hava gingið arbeiðsleysur síðan tá, er hann nú aftur venjari, - hesaferð hjá Newcastle, sum skal lyfta seg av einum vónbrótandi 11. plássi í Premier League.

Áskoðarnir hjá Sunderland larma mest!

Nú hava teir mált hvussu nógv áskoðarnir á teimum ymsu leikvallunum í Onglandi larma. Manchester United er bert nr. 17 á hesum listanum

???
Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo

Alex Ferguson hevur givið áskoðarafjøldini á Old Trafford av grovfíluni. Tá Manchester United leiktu sín heimadyst ímóti Birmingham City, tók Ferguson til orðana, at tað mest av øllum minti um eina jarðarferð. Og desibelmátingarnar á teimum ymsu leikvøllunum í Premier League geva Ferguson lutvíst rætt. Desibelmátingarnar á Old Trafford hava eitt meðal áljóðandi 117,5 desibel, sum er eitt sindur meir enn ein borimaskina, men eitt sindur minni enn eitt flogfar á einari landingarbreyt. Men Ferguson hevur rætt, at United-áskoðarafjøldin hevur nógv at læra av øðrum heimaáskoðarum.

Sunderland best

Hóast tað einki stendur til ítróttarliga hjá Sunderland, so er rómurin stórur á Stadium of Lights. Sunderland hevur eitt meðal áljóðandi 129,2 desibel. Hetta er á markinum til pínslu fyri menniskjaliga oyra. Av teimum fýra oddaliðunum er tað bara Chelsea, sum er í ovaru hálvu, tá tað kemur til desibil-mátingarnar. Liverpool-áskoðarnir kunnu tó reypa av, at eiga desibil-metið við ein einstakan dyst. Hetta hendi, tá John Arne Riise skoraði í 1. minutti av Liga-Cup finaluni á Millenium Leikvøllinum í Cardiff í 2005. Rómurin og gangurin av Liverpool-áskoðarunum náddi tá uppá 130,7 desibel, sum er heimsmet. Gamla metið áttu áskoðarnir hjá amerikanska fótbóltsliðnum, Denver Broncos. Tað metið var frá 2000. Kanningin hjá »118 – 118« vísti eisini, at áskoðarnir hjá Everton eru teir, sum syngja oftast!

Desibel-listin:

Sunderland	129,2
Tottenham	128,2
Manchester C	127,4
Aston Villa	126,5
Everton	126,1
Chelsea	125,8
Middlesbrough	125,4
Derby	124,7
Newcastle	124,5
West Ham	123,8
Birmingham	122,7
Arsenal	122,3
Portsmouth	120,9
Blackburn	119,5
Bolton	119,1
Liverpool	118,9
Manchester U	117,5
Wigan	116,8
Reading	116,2
Fulham	115,4

Kyndil-VÍF 31-25 (16-11):

Kyndil sveittaði ikki

Sjáldan man Kyndil hava havt tað somikið lætt móti VÍF, sum varð sent norður við rættiligum avsmurningi

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Talan gjørdist ongan tíð um nakran spennandi dyst í Ítróttarhøllini á Hálsi í Havn mikukvøldið. Tá mansliðini hjá Kyndli og VÍF hittast, plagar hetta annars at borga fyri intensiteti og spenningi, men tað var nú hampuliga langt millum snapsirnar mikukvøldið. Ja, somikið langt, sum tað sømir seg einum avhaldsfelag.

Høgni við

Sæð burtur frá fyrstu rótutu 10 minuttunum, har liðini kappaðust um at gera mistøk, so var tað nevnliga Kyndil, sum var greitt omaná. Teir grønu spílaðu seg sum so ongan tíð veruliga út, men fyri tað mest var talan um lítla og onga mótstøðu. Eli Müller í VÍF-málinum hevði hópin av góðum bjargingum, men hetta munaði lítið, tá restin av ilðnum als ikki livdi upp til góða málmansavrikið.

Høgni Klein var aftur við hjá Kyndli, og tað kann væl hava við sær, at meistararnir nú fara at gera meira um seg
Mynd: Álvur Haraldsen

Hjá Kyndli var hugaligt at síggja, at Høgni Klein aftur er at síggja á liðnum. Enn er orkan ikki til hondbólt við fullari ferð í 60 minuttir, men tað var sjónligt, at tað gav meira flog, breidd og djúpd í spælið, at hann nú aftur er tøkur.

Hvussu langt hesin styrkurin røkkur, er kanska ilt at siga, tí tað er als ikki víst, at Høgni verður í Føroyum kappingarárið á tamb. Men tvær hálvfinalur í steypakappingini standa fyri framman, og tað er helst fyrst og fremst í hesum, at Kyndil vil bjargað sær kappingarárið.

Langt til FM-finaluna

Tí í landskappingini er munan, men tað krevur, at liðið mest sum als ikki missir stig seinasta partin av kappingini.

Her var VÍF nakað nógv betur við undan mikukvøldinum. Og við einum sigri í Havn kundu teir veruliga lagt trýst á Neistan og H71, sum fara at dystast um vikuskiftið. Men skulu vestmenningarnir leggja trýst á, so fer tað krevja avrik, ið eru nakað nógv betri, enn tey vóru tað mikukvøldið.

FAKTA

Kyndil-VÍF 31-25 (16-11)
10 min: 3-3
20 min: 10-7
40 min: 20-12
50 min: 28-20
Málskjúttar
Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 10(6), Janus Einar Sørensen 9, Finnur Hansson 4, Josef Abrahamsen 3, Høgni Klein 3, Hanus Johansen 1, Hjalti M. Jacobsen 1
VÍF: Áki Olsen 5(2), Agnar Joensen 4, Johan P. Høgnesen 4, Niels Andreasen 3, John M. Andreasen 2, Daniel Rapa 2, Regin Joensen 2(1), Rói Lamhauge 1, Rúni Joensen 1, Bjarti Hansen 1
Brotskøst: Kyndil 6, VÍF 3
Útvísingar: Kyndil 1, VÍF 3

Jakob ger come-back

42 ára gamli Jakob Jónsson verður partur av mansliðnum hjá Neistanum seinastu 6 og møguliga 8 dystirnar av kappingarárinum

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Hóast Neistin enn er á øðrum plássi í Atlantic Airways-kappingini, so hevur gongdin hjá liðnum ikki verið eins góð seinastu dystirnar, sum hon var tað fyrsta partin av kappingini.

Og líkt er til, at leiðslan í felagnum avgjørt hevur ætlanir um at styrkja um hópin, nú seinastu og kanska avgerandi dystirnir standa fyri framman.

Fyri stuttum var greitt, at Jacob Larsen nú verður aftur at síggja í málinum, og nú er so greitt, at ein annar Jakob eisini fer at gera um seg á vøllinum. Hóast 42 ára gamal, so telist Jakob Jónsson enn millum fremstu hondbóltssnillingarnar í Føroyum. Í vetur hevur hann virkað sum venjari hjá Neista-kvinnunum, samstundis sum hann hevur hugnað sær á 2. deildarliðnum hjá Kyndli, men nú setir hann ferðina upp í so máta.

- Ingi (Olsen, blðm.) spurdi meg, um eg ikki hevði hug at taka eitt tørn afturat. Og tað hevði eg. Sum kappingin er skipað, so ber eisini til hjá mær at vera venjari hjá kvinnunum, samstundis sum eg spæli við monnunum. Og tað ætli mær so at gera í seks og vónandi átta dystir, sigur Jakob Jónsson.

Harpiskið var annars sett á hillina, men nú verður Jakob Jónsson aftur at síggja í fremstu rød í føroyskum hondbólti